# Bara Holst á vøllinum

Hvørgin av teimum føroysku spælarunum í AaB vóru á vøllinum í dystinum millum AaB og Lyngby í gjár. Súni Olsen var ikki tikin út til hópin. Tað var Jón Rói Jacobsen hinvegin, men hann spældi ikki. Hjá Lyngby var føroyski landsliðsspælarin Christian Lamhauge Holst á beinkinum, men beint eftir at AaB hevði skorað til 4-3, varð Holst skiftur inn, men hann fekk ikki vent gongdini.



# AaB vandi 0-3 til 5-3

Tað gjørdist ein sermerktur dystur, tá ið toppliðið AaB og botnliðið Lyngby hittust í donsku superliguni um vikuskiftið. Ein hevði roknað við, at Lyngby fór at gera nakað við AaB, men botnliðið legði seg á odda heili 3-0 í dystinum í Aalborg. AaB minkaði beint fyri hálvleikssteðgin, og í seinna hálvleiki trumlaði oddaliðið Lyngby niður. Úrslitið gjørdist 5-3, og AaB er nú einsamalt á odda í superliguni

# Dómararnir náddu ikki Smyril

**Rúni Mohr og Ragnar Simonsen sóu bert í reyvina á Smyrli, tá hesin legði frá landi. Og so máttu lokalar kreftir traðka til, tá VÍF vitjaði í Vági**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Hóast alt, so fingu VB og VÍF avgreitt dystin sínamillum. Og her gjørdist talan um tryggan sigur til VB*
*Mynd: Bjartur Joensen*

Kvinnurnar hjá VÍF høvdu fyrireikað seg væl, tá tær fóru til Vágs at spæla um vikuskiftið. Longuleygardagin fóru tær suður, og tí vóru tær til reiðar at spæla, tá dysturin skuldi blásast ígongd.

Men dómarar vóru eingir. Rúni Mohr og Ragnar Simonsen, sum skuldu døma dystin, men hálkan sunnudagin bar við sær, at Rúni ikki kom nóg tíðliga til Havnar av Eiði, har hann er búsitandi.

- Eg veit væl, at tað ikki er nøkur umbering. Men hálkan seinkaði mær, og tí gjørdist eg akkurát ov seinur til bátin. Eg sá bara í reyvina á Smyrli, og so kundi tað sjálvandi gera tað sama, segði ein harmur Rúni Mohr, tá vit sunnukvøldið tosaðu við hann.

- Eg fáa bara sagt aftur og aftur, hvussu harmur eg eri um hetta. Tað er jú slíkt, sum barasta ikki má henda. Men samstundis má eg siga, at bæði VB og VÍF tóku hetta ótrúliga væl. Og tað gleðir meg, at tað hóast alt bar til at spæla dystin, sigur Rúni

## Lítil spenningur

Úrslitið gjørdist, at Egill Steintórsson og Kári Niclassen traðkaðu til at døma dystin, og hóast tað varð gjørt undir protest, so fór VÍF á vøllin. Ikki minst tí tær nú kortini høvdu verið heilt samdøgur í Suðuroy.

Og tað skal sigast, at har var lítil ivi um, hvør skuldi vinna dystin. Eftir eina hampuliga javna byrjan, so fekk VB veruliga gongd á seinastu løtuna fyri steðgin, og tí takinum sleptu tær ongantíð.

Við Daivu Toumaite á odda skutu tær seg alsamt longur frá VÍF, sum ongan tíð megnaði at svara aftur.

**FAKTA**

**VB-VÍF 28-16 (15-10)**
10 min: 4-2
20 min: 9-7
40 min: 19-12
50 min: 23-14

**Málskjúttar**
**VB:** Daiva Toumaite 14 (2), Christina Holm 4, Maria Milicevic 2, Theresa Joensen 2, Svava Vestergaard 2, Laila Jespersen 2, Miriam Michelsen 1, Carol Kjærbech
**VÍF:** Fríða Marjunardóttir 4, Ioana Rapa 4(2), Liljan Djurhuus 3(1), Heidi Joensen 2, Torgunn Johannesen 2(1), Elisa Leo 1
**Brotskøst:** VB 3, VÍF 6
**Útvísingar:** VB: 3, VÍF 2
**Dómarar:** Egill Steintórsson & Kári Niclassen

# Pál heiðraður í Vági

**Tá Pál Joensen sunnukvøldið kom til Vágs, var stór móttøka at heiðra raska svimjaran**

SVIMJING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Gomlu handilshúsini á Marknoyri vóru karmur um móttøkuna, eftir at fýrverk varð skotið, tá Pál Joensen kom til Vágs í gjár, eftir ómetaliga góðu úrslitini í svimjikappingini NJM, har hann av álvara gjørdi vart við seg.

Nógv fólk møtti upp at heiðra Pál. Ásgerð Stenberg, býráðslimur, helt røðu og handaði gávu. Hans Joensen, Hans í Líðini nevndur, er býráðslimur og pápabeiggi Pál. Hann helt røðu og hevði eisini yrkt sangir til løtuna. Ymisk nýttu høvið at heilsa svimjaranum við góðu úrslitunum. Mannbjørn Tausen umboðaði Suðuroyar Sparikassa og eisini vóru ymsar gávur handaðar. Heri Mortensen, fyrrverandi svimjari á høgum støði og fyrrverandi formaður í Vágs Svimjifelag, heilsaði Pál og kom við greiðum metingum og tølum, ið søgdu nakrar sannleikar um, hvussu frammaliga Pál nú í veruleikanum er.